e-mail: jakup@sosialurin.fo

Ítróttur

Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

**Triðja umfar av kappingini í triðju deild hjá monnum verður umrøtt í morgin**

# Fleiri stórsigrar hjá kvinnunum

*Fleiri stórsigrar vóru at síggja um vikuskiftið í 3. umfari í fótbóltslandskappingini hjá kvinnunum. VB, B36 og KÍ tóku sær veruliga av løttum, meðan hitt "stóra" liðið í føroyskum kvinnufótbólti, HB, eisini megnaði at draga ein sigur í land*



*Í Gundadali var eingin ivi, tá B36 tók ímóti EB/Streymi. Heimaliðið vann ikki minni enn 12-0*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

HEINI Í SKORINI

Í bólki A møttust GÍ-HB í Gøtu, AB-Sumba á Argjum og VB-Skála í Vági. Mest áhugaverdi dystur í hesum bólki var uttan iva dysturin millum gøtukvinnurnar og føroyameistararnar frá í fjør, HB. Lagt var upp til ein spennandi dyst, hóast HB var favorittur at vinna dystin. Dysturin endaði kanska ikki so óvæntað við, at HB var omaná, men munurin millum liðini var ikki stórur. Fyrsta málið hjá HB kom í 8. minutti, og var tað enn einaferð Maria Johnsson, sum vísti hvussu vandamikil hon er. Hon fekk bóltin nakað uttanfyri brotsteigin, og síðani gjørdi hon ikki mætari enn at langa bóltin í stólpan og inn í GÍ málið uttan nakran livandi møguleika hjá GÍ málverjanum. Henda støðan helt sær stóran part av dystinum, men í 50. minutti gjørdi HB gøtukvinnunum greitt, hvør skuldi hava øll trý stigini. HB fekk hornaspark, og eftir at bólturin var komin útfrá, endurtók Eyðfríð Christiansen bragdi hjá Mariu, og langaði bóltin í yvirleggjarin og síðani í netið. HB hevur nú fult stigartal, og síggja eisini út til at hava fult tamarhald á støðuni í bólki A.

Á Argjum tók AB ímóti Sumba, og var hetta fyrsti dysturin hjá AB í ár, av tí hinir báðir dystirnir vórðu útsettir. Ikki kann sigast annað, enn at tær fingu eina góða byrjan uppá kappingina við at vinna 2-1 á Sumba. AB legði seg á odda í 27. minutti, við máli sum Maria Mikkelsen skeyt. Men 10 minuttir inn í seinna hálvleik eydnaðist innskiftu Anniku Thomsen at javna fyri Sumba. Men tá bert 12 minuttir vóru eftir at leika, tók bert 15 ára gamla Elin Kathrina Haraldsen sakina í egnar hendur og skoraði sigursmálið, sum uttan iva kom sera væl við hjá AB.
VB hølvaði Skála av suðuri í Vági. Endaliga úrslitið gjørdist ikki minni enn 14-1 til VB, og er hetta seinna stórtapið hjá Skála í ár. Í fyrsta dysti teirra taptu tær nevniliga 9-0 móti HB í Havn. Halltóra Joensen skeyt ikki minni enn seks mál, og hon er nú toppskjútti í 1. deild. Annars skutu Laila Jespersen og Sóleyð Holm tvey mál í part, meðan Rannvá Augustinusen og Diana Dahl fingu hvør sítt, og tvey mál vóru sjálvmál.

**Stórsigrar í bólki B**

Í bólki B tók B36 ímóti EB/Streymi í Havn, meðan KÍ skuldi suður til Sandoyar at spæla móti B71. Tveir stórsigrar komu burtur úr hesum báðum dystum, og og eftir hetta umfarið er lítil ivi um, hvørji lið vera á fyrsta og øðrum plássi í bólki B. B36 vann sum sagt stórsigur á EB/Streymi í Gundadali, og tá avtornaði hevði B36 fingið heili 12 mál, meðan EB/Streymur ikki megnaði at fáa bóltin í málið hjá havnarliðnum.

Rakul N. Joensen skeyt ikki minni enn fimm mál, meðan Laila Enghamar skeyt tvey, og Elsebeth Jónsson, Sólgerð Viderø, Arnbjørg Danielsen og Marjun Jógvansdóttir fingu allar eitt mál í part, og síðsta málið var so eitt sjálvmál. B36 var, sum úrsliti eisini boðar frá, nógv tað betra liðið, og tær fara ikki at hava stórvegis trupuleikar við at spæla seg í endaspælið. Harafturímóti má okkurt henda, og tað í stundini, um EB/Streymur skal gera sær nakrar vónir um at enda millum trý tey fremstu liðini, sum jú gevur atgongd til endaspælið.

Hin dysturin í bólki B var millum KÍ og B71 suðuri á Sandi, og sum nevnt, kom eisini ein stórsigur burturúr hesum dysti, tó ikki líka stórur sum í Havn. KÍ endaði dystin við átta málum móti tveimum, og ikki kann sigast annað, enn at hetta var ein uppiborin sigur til gestirnar, hóast tað sá sera javnt út tað einu løtuna. Sandoyingar komu nevniliga sera óvæntað á odda 2-1 í fyrra hálvleiki, men KÍ fekk smoykt sær framum beint áðrenn hálvleikssteðgin, so hálvleiksstøðan var 3-2 til klaksvíkingarnir. Í seinna hálvleiki gekk spælið bara ein veg, og tá avtornaði, var úrsliti sum sagt 8-2 til KÍ. Fyri KÍ skoraði Rannvá Andreassen fýra mál, Malena Josephsen tvey, og Mariann Joensen og Ann Olsen skutu hvør sítt mál. Hjá Sandoyingum skoraðu Elin Højsted og Tóra Nolsøe hvør sítt mál.

Hetta vikuskiftið var tað NSÍ, sum ikki leikti nakran dyst, av tí at bert fimm lið eru í bólki B, men tær hava ein sera týðandi dyst næsta vikuskiftið á Sandi móti B71, og í bólki B verður tað nokk millum hesi bæði liðini, at slagið um týdningarmikla triðja plássi fer at standa ímillum, av tí at EB/Streymur neyvan hevur nakran møguleika at koma víðari.

**Bólkur A**

**HB-GÍ 2-0**
Maria Johnsson 1, Eyðfríð Kristiansen 1.

**VB-Skála 14-1**
VB: Halltóra Joensen 6, Laila Jespersen 2, Sóleyð Holm 2, Diana Dahl 1, Rannvá Augustinussen 1, sjálvmál 2.
Skála: ?

**AB-Sumba 2-1**
AB: Elin Kathrina Haraldsen 1, Maria Mikkelsen 1.
Sumba: Annika Thomsen 1.

**Bólkur B**

**B36-EB/Streymur 12-0**
B36: Rakul N. Joensen 5, Laila Enghamar 2, Marjun Jógvandóttir 1, Sólgerð Viderø 1, Arnbjørg Danielsen 1, Elsebeth Jónsson 1, sjálvmál 1.

**B71-KÍ 2-8**
KÍ: Rannvá Andreassen 4, Malena Josephsen 2, Mariann Joensen 1, Ann Olsen 1.
B71: Tóra Nolsøe 1, Elin Højsted 1.

**Støðan, bólkur A**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 HB | 3 | 3 - 0 - 0 | 14 | 1 | 13 | 9 |
| 2 VB | 3 | 2 - 0 - 1 | 20 | 4 | 16 | 6 |
| 3 GÍ | 2 | 1 - 0 - 1 | 5 | 2 | 3 | 3 |
| 4 AB | 1 | 1 - 0 - 0 | 2 | 1 | 1 | 3 |
| 5 Sumba | 3 | 0 - 0 - 3 | 1 | 12 | -11 | 0 |
| 6 Skála | 2 | 0 - 0 - 2 | 1 | 23 | -22 | 0 |

**Støðan, bólkur B**

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | málmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 2 | 2 - 0 - 0 | 16 | 1 | 15 | 6 |
| 2 KÍ | 2 | 2 - 0 - 0 | 14 | 3 | 11 | 6 |
| 3 NSÍ | 2 | 1 - 0 - 1 | 5 | 7 | -2 | 3 |
| 4 B71 | 3 | 1 - 0 - 2 | 5 | 12 | -7 | 3 |
| 5 EB/Str. | 3 | 0 - 0 - 3 | 1 | 18 | -17 | 0 |

**Máltindurin**

| | | |
|---|---|---|
| Halltóra Joensen | VB | 10 |
| Rakul N. Joensen | B36 | 7 |
| Rannvá Andreasen | KÍ | 6 |
| Maria Johnson | HB | 5 |
| Eyðfríð Christiansen | HB | 4 |
| Malena Josephsen | KÍ | 4 |
| Kristbjørg Isaksen | GÍ | 3 |
| Annika Godtfred | HB | 3 |
| Irdi Hansen | NSÍ | 3 |

adidas



# Teir gomlu spæla í Suðuroy

*Triðingurin av leikarunum í fremstu deildini, sum hava hildið 30 ára føðingardag, spæla við einum av suðuroyarfeløgunum, og nærum helvtin av útlendsku leikarunum eru farnir um 30 ára markið*



*Miðalaldurin hjá NSÍ man vera ein hin lægsti í landinum. Á myndini sæst Arnfinn Langgard, sum er ein av bert tveimum leikarum hjá NSÍ, sum er farin um tey tríati*

Tað er vanligt, at í næstan hvørjum felagi finnast tilkomnir leikarar, ið enn hava vilja og orku til at luttaka í kappingum á høgum stigi og stuðla teimum yngri við sínum drúgvu royndum.

Í føroyskum fótbólti eru leikarar yvir tey tríati í øllum liðunum.

Merkisvert er, at av teimum 32 spælarum omanfyri 30 ára aldur, sum higartil hava leikt í 1.deild , umboða 11 teirra tey bæði suðuroyarfeløgini. Hetta kundi bent á, at bæði VB og Sumba mangla ungar kreftir. Evnaríkar leikarar, ið eru førir fyri av taka yvir í bestu føroysku deildini.

Sjey vágbingar, ið eiga fastan sess á besta liðnum í bygdini, eru føddir í sekstiárunum. Og umframt teir fýra sumbingarnar, sum longu hava verið á vøllinum í hesum kappingarárinum, sita vanliga fastir fúsir so sum Fróði Mortensen og Páll Magnar Kjærbæk skaddir uttanfyri. Báðir hava teir langt síðan hildið sín 30-ára føðingardag.

Tíggju av teimum 32 »gomlu leikarunum« í 1.deild eru av útlendskum uppruna.

Tað merkir, at næstan helvtin av útlendingum í føroyskum fótbólti eru yvir 30-ára aldursmarkið.

Eisini tann elsti leikarin í 1.deild, og elsti málskjúttin eru útlendingar, ávikavist úr Póllandi og Rumenia.

39-ára gamli Waldemar Nowicki hevur vart málið hjá B71 í nógv ár, meðan hin 37-ara gamli Gheorghe Ciure úr HB á fyrsta sinni luttekur í føroysku kappingini.

Tann lítli rumenin, ið eisini er róptur Gigi, skoraði einasta málið í dystinum millum HB og KÍ. Gigi er eisini elsti útileikarin í 1.deild, sum er fastur maður á sínum liði.

Elsti føroyski leikarin í fremstu deildini higartil er (leikandi) venjarin hjá B68, Jóannes Jakobsen.

Fyrrverandi landsliðsformaðurin og núverandi B68-venjarin, ið er 38 ár í dag, skifti seg sjálvan inn móti endanum av dystinum í Sumba, tá leikarar hansara høvdu greiða fermála leiðslu..

Jóannes spældi ikki í 1.deild í 1998 og 1999, og seinast hann var at síggja á vøllinum á so høgum støði, var fyri næstan trimum árum síðani, tá ið hann vandi klaksvíkingar.

Tað gekk ikki so væl hjá Jóannesi Jakobsen ta lítlu løtuna, meðan hann var á vøllinum suðuri á Krossinum. Hann fekk eitt gult kort, og so minkaði heimaliðið um munin til endarliga úrslitið 4-1.

Málskjúttin hjá sumbingum, 34-ára gamli Jan Poulsen, er elsti føroyski málskjúttin í 1.deild, nú trý umfør eru leikt.

Liðfelagi hansara, Marlon Kjærbo, er elsti føroyingurin, ið dagliga leikar í 1.deild.

Royndi verjuskansin hjá sumbingum, sum fyllir 38 í ár, kom aftur til barndómsfelagið eftir eitt ár í útlegd á Tvøroyri.

Vit kunnu eisini nevna, at tað er møguligt, men ikki serliga sannlíkt, at teir elstu leikararnir í 1.deild í fjør, toftamaðurin Aksel Højgaard og runavíkingurin Ábraham Hansen (báðir eru føddir í 1959) fara at gera eitt „come-back“ afturat.

IE

Á talvuni sæst, hvussu nógvir av leikarunum hjá einstøku feløgunum eru omanfyri 30 ár.

Bert leikarar, sum hava verið á vøllinum í fremstu deildini í ár eru íroknaðir

| | | |
|---|---|---|
| **VB** | 7 (5) | Eyðun Kjærbo 32, Krzystof Popczynski 32, Eyðun Jacobsen 31, Magni Jacobsen 31, Jón Pauli Olsen 31, Robert Cieslewicz 31, Tórður Holm 31 |
| **Sumba** | 4 (3) | Marlon Kjærbo 37, Jan Poulsen 34, Tryggvi Nielsen 31, Spasojé Biberdzic 30 |
| **KÍ** | 4 (1) | Andrzej Pacek 35, Marek Wierzbicki 35, Tomislav Sivic 33, Harley Bertholdsen 31 |
| **GÍ** | 3 (3) | Pauli Jarnskor 35, Jóan Petur Olsen 32, Magni Jarnskor 31 |
| **FS Vágar** | 3 (1) | Emil Hentze 32, Darius Magdisauskas 30, Remigius Mikoliunis 30 |
| **HB** | 3 (2) | Gheorghe Ciure 37, Rói Árting 32, Ingi Rasmussen 31 |
| **B68** | 2 (2) | Jóannes Jakobsen 38, Jan Dam 31 |
| **NSÍ** | 2 (2) | Arnfinn Langgaard 32, Eddie Mikkelsen 30 |
| **B36** | 2 (2) | Jens Martin Knudsen 32, Dánjal Petur Johansen 32 |
| **B71** | 2 (1) | Waldemar Nowicki 39, Eli Hentze 30 |

*( ) føroyskir leikarar eldri enn 30 ár í felagnum

**Aldursfórsetar í 1.deild**

| | | |
|---|---|---|
| Waldemar Nowicki (PÓL) | B71 | 23.01.61 |
| Jóannes Jakobsen | B68 | 25.08.61 |
| Gheorghe Ciure (ROM) | HB | 12.10.62 |
| Marlon Kjærbo | Sumba | 12.11.62 |
| Andrzej Pacek (PÓL) | KÍ | 10.11.64 |
| Pauli Jarnskor | GÍ | 04.02.65 |
| Marek Wierzbicki (PÓL) | KÍ | 26.04.65 |
| Jan Poulsen | Sumba | 31.10.65 |
| Tomislav Sivic (YUG) | KÍ | 28.08.66 |

## Ungir málverjar

*Bert tveir málverjar í fremstu fótbóltsdeildini eru farnir um tey tríati, og teir eru báðir útlendingar*

Málmenn í fótbólti eru vanliga nógv longri virknir, enn útileikarar. Hetta er júst ein orsøk til, at miðalaldur av fótbóltsmálverjum runt allan heimin liggur um 30-ára markið.

Í fóroyskum fótbólti er støðan málmonnum viðvíkjandi tó heilt øðrvísi.

Allir átta føroyngar, ið dagliga verja málið i fremstu deildini, eru í tjúgunum, og bert teir báðir útlendingarnir, Waldemar Nowicki (B71) og Remi Mikoliunus (FS Vágar) hava fylt tríati.

Eykamenninir hjá flestu føstu málmonnunum eru heldur ikki gamlir í garði. Og tað er bert Jens Martin Knudsen, sum í sínum lítla steðgi heima vardi málið hjá B36 í 1.umdari, sum er føddur í seksti-árunum.

Jens Martin fyllir 33 ár um ein mánað. Honum á baki er ein annar maður við landsliðsroyndum, Bjarni Johansen. Vágbingurin, ið sostatt er aldursfórseti millum føroyskar málmenn í 1.deild, verður 29 ár seinni í hesum mánaðinum.

IE



*Tróndur Vatnhamar úr B36 er annar av málverjunum í fremstu deildini, sum bert eru 20 ára gamlir. Hin er Magnus Poulsen úr B68. Til stuttleikar kann nevnast, at teir báðir vóru liðfelagar í yngru deildunum*

**Talvan sýnir núverandi málverjar í fyrstu deild, býttir eftir aldri**

| | | |
|---|---|---|
| Waldemar Nowicki | B71 | 39 |
| Remi Mikoliunis | FS Vágar | 30 |
| Bjarni Johansen | VB | 28 |
| Bárður Johannesen | HB | 26 |
| Rúni Joensen | NSÍ | 25 |
| Eigil Olsen | Sumba | 25 |
| Gunnar á Steig | KÍ | 23 |
| Sunvard Joensen | GÍ | 21 |
| Tróndur Vatnhamar | B36 | 20 |
| Magnus Poulsen | B68 | 20 |